VINNUMÁLARÁÐIÐ

# Frágreiðing um bygnaðin í fiskivinnuni á landi

30. januar 2003

# Innihaldsyvirlit


Frágreiðing um bygnaðin í fiskivinnuni á landi ..... 1
1 Inngangur og niðurstøður ..... 3
1.1 Inngangur ..... 3
1.2 Um bakgrundina ..... 3
1.3 Um arbeiðssetningin ..... 3
1.4 Niðurstøður og tilmæli viðvíkjandi fiskivinnuni á landi ..... 4
2 Karmar um fiskivinnu og kapital ..... 6
2.1 Marknaðarbúskapur ..... 6
2.2 Karmar ..... 6
2.3 Kappingarføri ..... 7
2.4 Verandi bygnaður í fiskivinnuni á landi í Føroyum ..... 7
2.5 Bindingar í fiskivinnuni á landi ..... 9
2.6 Alheimsgerðingin og fiskivinnan ..... 12
2.7 Altjóða marknaður og ognarpartur ..... 12
3 Fiskivinnan á landi og tørvurin á kapitali ..... 16
3.1 Eginpeningur og lánipeningur ..... 16
3.2 Møguligir íleggjarar ..... 17
3.3 Útlendskar íløgur í fiskivinnuni á landi í Føroyum ..... 18
4 Miðsavning av eigaraviðurskiftunum ..... 21
4.1 Miðsavning í mun til sølu- og keypsmarknaðin ..... 21
4.2 Miðsavning á heimamarknaði ella útflutningsmarknaði ..... 21
4.3 Altjóða mát fyri miðsavning ..... 22
4.4 Fyrimunir og vansar við at miðsavna eigaraviðurskiftini í fiskivinnuni á landi ..... 23


Herumframt fylgiskjøl 1 til 3

# 1 Inngangur og niðurstøður

## 1.1 Inngangur

Landsstýrismaðurin í vinnumálum setti 9. august 2002 ein arbeiðsbólk at útgreina ymisk viðurskifti av týdningi fyri bygnaðin í fiskivinnuni á landi. Arbeiðsbólkurin varð mannaður soleiðis:

| | |
|---|---|
| Agnar Jensen | Vinnuhúsið |
| Andras Kristiansen | Fiskimálaráðið |
| Heðin Weihe | Fiskimálaráðið |
| Jan Mortensen | Vinnuhúsið |
| Kjartan Kristiansen | Menningarstovan |
| Maria Róin | Vinnumálaráðið, formaður |

## 1.2 Um bakgrundina

Landsstýrismaðurin setti arbeiðsbólkin eftir, at Framtaksgrunnur Føroya 12. juni 2002 skrivliga spurdi landsstýrismannin, um samsvar er millum uppskotið hjá Framtaksgrunninum og hugburðin hjá sitandi samgongu um at einskilja Føroya Fiskavirking og Føroya Fiskasølu, og hvat samgongan heldur um, at útlendingar møguliga keypa partar av Føroya Fiskavirking og Føroya Fiskasølu.

Í politiska orðaskiftinum, sum stóðst av fyrispurningunum frá Framtaksgrunninum, er ført fram, at nýggj lóggáva møguliga skal tryggja samfelagið ímóti vansum, ið kunnu standast av at selja fiskivinnufyritøkur á landi.

Fyri at tryggja verandi og komandi eigarum av fiskivinnufyritøkum á landi støðugar karmar at virka í og ásannandi, at tørvur er á fakligum greiningum, sum kunnu vera grundarlag undir politisku viðgerðini av spurningum, ið snúgva seg um fiskivinnuna á landi, er arbeiðsbólkurin settur at[1]:

- **Lýsa hvør tørvur er á kapitali í fiskivinnuni á landi**
- **Lýsa møguligar fyrimunir og vansar við útlendskum ognarparti í fiskivinnuni á landi**
- **Lýsa møguligar fyrimunir og vansar við at miðsavna eigaraviðurskiftini í fiskivinnuni á landi**
- **Lýsa í hvønn mun útlendskur ognarpartur kann ávirka bygnaðin í fiskivinnuni á landi**
- **Gera møguligt tilmæli um lóggávu á økinum**

Viðmerkjast skal, at arbeiðsbólkurin hevur ikki viðgjørt skrivið, sum Framtaksgrunnurin sendi landsstýrismanninum ella serstakar fyritøkur, men bara hildið seg til arbeiðssetningin frá landsstýrismanninum.

## 1.3 Um arbeiðssetningin

Arbeiðsbólkurin hevur á fleiri fundum umrøtt arbeiðssetningin og heldur, at hann má útgreinast.

Sum sæst, skal arbeiðsbólkurin svara fýra yvirskipaðum spurningum av týdningi fyri bygnaðin í fiskivinnuni á landi og siga, um tað við lóg skal avmarkast, hvussu nógv útlendingar skulu kunna eiga í fyritøkum í fiskivinnuni á landi. Í arbeiðssetninginum verður eisini óbeinleiðis spurt, um tað við lóg skal forðast fyri, at sami eigaraskari sleppur at eiga stóran part av fiskivinnuni á landi. Tílíkar forðingar eru í løtuni bara í alivinnuni.

---

[1] Víst verður til fylgiskjal 1

Arbeiðsbólkurin hevur avgjørt at lýsa settu spurningarnar í arbeiðssetninginum við støði í samfelagsligum áhugamálum. Lyklaorðini eru í høvuðsheitum **karmar** og **kappingarføri,** herundir virðisskapan og minni lógarstýring. Fyri at sleppa undan møguligum misskiljingum hevur arbeiðsbólkurin í **fylgiskjali 2** lýst, hvussu hann fatar orð og hugtøk í arbeiðssetninginum.

## 1.4 Niðurstøður og tilmæli viðvíkjandi fiskivinnuni á landi

Almenna vinnupolitiska stevnan er, at allar vinnur skulu vera sjálvberandi og skapa avkast, framburð og vælferð í altjóða kapping, samstundis sum tær raðfesta trivnaðin og umhvørvið høgt. Fiskivinnupolitiska stevnan er, at tað almenna skal virka fyri, at tann almenni leikluturin sum partaeigari í fiskivinnuni á landi verður niðurlagaður. Lønsemið í fiskivinnuni á landi er ein av fyritreytinum fyri at tryggja støðugar arbeiðs- og inntøkumøguleikar um alt landið. Skal vinnan vera við til at varðveita og menna lokalsamfeløgini, má hon sostatt kasta pening av sær.

Tá tað snýr seg um ognar- og avgerðarrætt í fiskiveiðu og alivinnu í Føroyum, samsvara lóggáva og hugburður ikki við hugsanina um frían marknaðarbúskap. Henda frágreiðing umrøður ikki trupulleikarnar at umsita reglurnar um tilfeingið. Hon staðfestir tó, at fiskivinnan á landi er ein fræls vinna, uttan serstakar ræðisavmarkingar.

Arbeiðsbólkurin heldur, at verða ávísar vinnur vardar við lóg, kann tað umframt økta almenna umsiting hava við sær víðfevndar vinnupolitiskar avleiðingar og fáa prinsipiellan týdning fyri einskiljingar av almennum fyritøkum í framtíðini og tí eisini fyri búskaparpolitisku kósina í samfelagnum.

Arbeiðsbólkurin heldur tað vera til bága samfelagsbúskaparliga, vinnupolitiskt, umsitingarliga og vinnuliga at avmarka rættin hjá útlendingum at eiga í føroyskari fiskivinnu á landi. Heldur ikki eigur at verða ásett við lóg, hvussu stórur partur av fiskivinnuni á landi kann vera á einstøkum hondum. Arbeiðsbólkurin mælir til, at skundað verður undir tilgongdina at avtaka almenna leiklutin í fiskivinnuni á landi.

Tað er ein andsøgn, at tað almenna ætlar at einskilja fyritøkur fyri at minka um almennu stýringina av vinnulívinum og samstundis avmarkar við lóg, hvør kann gera íløgur í føroyskt vinnulív. Hetta er bara ein annar máti hjá tí almenna at stýra vinnuni.

Arbeiðsbólkurin setir tí onki lógaruppskot fram um tílíkar avmarkingar.

### 1.4.1 Tørvurin á kapitali

Arbeiðsbólkurin heldur tað vera eitt afturstig fyri møguleikarnar hjá vinnuni at tryggja fólki støðugar inntøkumøguleikar í landinum, um vinnan ikki frítt sleppur at leita upp tann kapital, hon heldur seg hava tørv á.

Vinnan er best før fyri at meta um, hvussu hon kann skapa sær neyðuga avkastið, tá hon virkar frítt á altjóða marknaðinum. Kennir hon seg tryggast við at dúva upp á vanabundna framleiðslu, hevur hon helst ikki so stóran tørv á kapitali frá nýggjum íleggjarum. Troytir hon hinvegin nýggjar leiðir innan vørumenning og framleiðslu, má hon støðugt hava kapital frá nýggjum íleggjarum.

### 1.4.2 Útlendskur ognarpartur

Samanumtikið heldur arbeiðsbólkurin, at útlendskur kapitaláhugi í føroyskari fiskivinnu á landi er tekin um og ivaleyst eisini ein fortreyt fyri, at vinnan kann veita fólki tryggar inntøkumøguleikar í

landinum. Útlendskur kapitalur í fiskivinnuni á landi kappast við føroyskan kapital, eitt nú hvat vitan og førleika viðvíkur. Henda kapping fer ivaleyst at hava við sær, at føroyskur kapitalur fer at spjaða fløgurnar á onnur øki enn fiskivinnuna.

Avkastið hjá fiskivinnuni á landi er treytað av, hvussu vinnan stendur seg á altjóða marknaðinum. Er vinnan kappingarfør, er henni lív lagað. Um føroysku fyritøkurnar kunnu veita brúkarunum tær vørur, sum hann vil hava, eru fyritøkurnar eisini áhugaverdar hjá útlendskum strategiskum íleggjarum. Hetta gevur fyritøkunum atgongd til nýggjan kapital, sum kann tryggja áhaldandi menning av virkseminum, og harvið at føroyska vinnan framhaldandi er kappingarfør.

## 1.4.3 Miðsavning av eigaraviðurskiftunum

Arbeiðsbólkurin heldur tað vera óneyðugt at avmarka, hvussu stóran part einstakur eigari kann eiga av fiskivinnuni á landi í Føroyum. Vit skulu hinvegin hava lóggávu, sum heimilar kappingarmynduleikanum at forða fyri, at virkir ikki misnýta sína marknaðarstøðu.

Tá kappingarmyndugleikar viðgera trupulleikar við miðsavning, verður tað vanliga gjørt fyri at tryggja brúkarunum eitt fjølbroytt úrval av bíligum og góðum vørum og tænastum. Vørurnar, sum føroyska fiskivinnan á landi framleiðir, verða seldar á altjóða marknaðinum, har tær eru ein brotpartur av samlaða úrvalinum, og tí ikki nøkur hóttan mótvegis fjølbroytta valinum.

Fiskivinnan á landi kappast innanhýsis og við útlendskar keyparar um runda fiskin, sum kann verða lagdur upp í Føroyum. Onki bendir á, at eini møguligari miðsavning av eigaraviðurskiftunum verður langt lív lagað, bjóðar miðsavnaða vinnan ikki støðugt kappingarføran prís og tænastur.

## 1.4.4 Ávirkan á bygnað

Arbeiðsbólkurin heldur ikki, at møguligur útlendskur kapitalur fer at ávirka bygnaðin í fiskivinnuni á landi í Føroyum. Útlendski kapitalurin hevur undir verandi umstøðum fría atgongd til vinnuna. Fær útlendskur kapitalur høvi til at koma inn í tær fyritøkur, sum grunnarnir eiga, verða møguligar bygnaðarbroytingar ivaleyst bara til tað betra.

## 1.4.5 Tilmæli um lóggávu á økinum

Arbeiðsbólkurin er samdur um, at tað samsvarar ikki við vinnupolitikkin og fiskivinnupolitikkin, sum løgtingið hevur tikið undir við, at seta fram tilmæli um lóggávu á økinum.

# 2 Karmar um fiskivinnu og kapital

## 2.1 Marknaðarbúskapur

Sambært marknaðarbúskaparliga ástøðinum er tað uppgávan hjá einstøku fyritøkuni støðugt at menna framleiddu vøruna fyri so lágan prís sum gjørligt, so hon er kappingarfør mótvegis vørum av nøkulunda sama slag. Sagt verður, at einstaka fyritøkan við at røkja egin búskaparlig áhugamál fremur tað, sum tænir samfelagnum best.

Hvørki marknaðarskipanin ella aðrar skipanir forða fyri, at monopol ella støður, ið minna um monopol, taka seg upp. Kostnaðarviðurskiftini kunnu natúrliga hava við sær, at summar vinnur hava fyrimun av stórdrift, og at stórar fyritøkur megna at framleiða vørur fyri lægri prís enn smáar. Hinvegin hava øll framkomin lond kappingarlógarreglur, sum beinleiðis ella óbeinleiðis forða fyri tílíkum óynsktum avleiðingum av marknaðarskipanini.

Marknaðarskipanin í sjálvum sær syrgir ikki fyri øðrum enn at uppfylla ynskini hjá brúkarunum. Skipanin hevur ikki annan moral innbygdan enn tann, sum keypararnir og seljararnir hava. Marknaðarskipanin er ein liðilig skipan. Við støðugari kapping á marknaðum fyri øll sløg av framleiðslum, arbeiðsmegi og kapitali lagast arbeiðsbýtið allatíðina til skiftandi umstøður.

Hóast marknaðarskipanin viðhvørt kann ávirka arbeiðsútboðið og býtið millum inntøkur og ognir, hava flestu fólkaræðisligu londini rættiliga frælsar marknaðarskipanir og lata í grundregluni vera við at seta í verk verjutiltøk. Soleiðis er altjóða rákið yvirhøvur.

## 2.2 Karmar

Í **samgonguskjalinum**[2] hjá sitandi landsstýrissamgongu stendur millum annað, at í fiskivinnuni á landi skulu skapast fríir og javnbjóðis kappingarmøguleikar, og at galdandi **vinnupolitikkur**[3] skal tryggja støðugleika og skapa karmar fyri vøkstri.

Í **fiskivinnupolitikkinum**[4] verður dentur lagdur á, at umstøðurnar hjá fiskivinnuni á landi eru nógv broyttar seinastu árini við alheimsgerð og minni lógarstýring, ið seta stór krøv um virkisføri og kappingarføri. Høvuðsstevnan er, at fiskivinnan á landi skal klára seg uttan stuðul ella onnur almenn inntriv, og at almenni leikluturin, sum partaeigari í fiskavirkjum á landi, verður niðurlagaður.

Vinnupolitiskir málsetningar, sum hava týdning fyri bygnaðin í vinnuni, eru millum annað:

- **búskaparligt og handilsligt umhvørvi, ið kann eggja til íløgur í Føroyum**
- **økt samstarv á altjóða marknaðum**
- **skilagóð eginfígging**
- **vandaligt lógarsmíð**

Ein av fortreytunum fyri, at vinnan kann vera kappingarfør, er, at almenni leikluturin í mest møguligan mun fylgir altjóða rákinum. Breið semja er um, at vinnan fær mest burturúr, tá hon virkar undir marknaðartreytum.

[2] Samgonguskjal 2002 – 2006 dagfest tann 6. juni 2002 millum Fólkaflokkin, Sjálvstýrisflokkin, Tjóðveldisflokkin og Miðflokkin. (bls. 6)

[3] Vinnupolitikkur – Løgtingsmál nr. 101-4/1998 til viðgerðar 14. apríl 1999

[4] Fiskivinnupolitikkur – Løgtingsmál nr. 101-4/2000 til viðgerðar 24. apríl 2001

Vert er í hesum sambandi at nevna, at føroyska vinnan ferð eftir ferð hevur gjørt vart við, at tað almenna eigur at leggja seg so lítið út í hennara viðurskifti sum gjørligt, serliga tí møguligir íleggjarar váða minni, tá tað almenna stýrir ov nógv.

Ein tann størsti bágin fyri eitt lítið oyggjasamfelag er handilsforðingar, tí tær forða fyri virknari kapping og effektivari nýtslu av landsins tilfeingi.

Fríhandil hevur harafturímóti stóran týdning fyri smáar búskapir, tí við fríhandli virkar vinnan eftir millumtjóða avtalum og altjóða skipanum, sum beina fyri politiskum, búskaparligum, bygnaðarligum og tøknifrøðiligum handilsforðingum. Hetta hevur stóran týdning fyri møguleikarnar hjá vinnuni at menna seg.

### 2.2.1 Marknaðaratgongd

Marknaðaratgongd er fortreytin fyri, at fiskivinnuni og samfelagnum sum heild er lív lagað. Stóri marknaðurin fyri føroyskar fiskavørur er sum kunnugt ES. Á hesum marknaði hava føroyingar rættiliga frælsa atgongd fyri vanligar fiskavørur, sum vit eisini útfluttu, tá handilssáttmálin við ES varð gjørdur. Tó vórðu tá ásettar kvotur og loft fyri, hvussu stórar nøgdir føroyingar kundu útflyta tollfrítt av ávísum fiskavørum. Hesar kvotur og loft vórðu í 1998 fyri tað mesta avtikin.

Tá tollforðingarnar hvurvu, gjørdust heilsufrøðiligu krøvini hjá ES størsta forðingin fyri útflutningi av feskum fiski. Men síðan 2001 eru Føroyar, tá tað snýr seg um fiskavørur, komnar upp í heilsufrøðiliga økið hjá ES, og fiskavørurnar hava nú frítt at fara inn á ES-marknaðin. Enn er hetta tó bara galdandi fyri fisk av føroyskum uppruna. Fiskavørur virkaðar úr fiski, sum ikki hevur sín uppruna í ES ella Føroyum, verða enn tollaðar sum triðjalandsvøra. Føroyar hava í fleiri ár samráðst við ES um at gerast partur av felagsevropeisku kumuleringini. Verða vit tað, kann íslendskur og norskur fiskur virkast í Føroyum og seljast sum føroyskur.

## 2.3 Kappingarføri

Kappingarførið hjá fiskivinnuni er í stóran mun treytað av vitanini um fisk, effektiva og dygdargóða framleiðslu, flutning, sølu og marknað. Fjølbroyttari virkismøguleikarnir eru, størri verður tørvurin á íløgum í vinnuna. Meira kann eisini fáast burturúr, um virkini fara at gagnnýta alt av fiskinum, sum verður avreiddur í Føroyum. Ein av nýggju møguleikunum er biotøkni.

Lønarlagið og trongar á arbeiðsmarknaðinum ávirka eisini kappingarførið hjá fiskivinnuni á landi. Føroysk virki eru bundin at sáttmálalønum, ið eru væl hægri enn lønirnar, sum kappingarneytarnir í Íslandi og Skotlandi útgjalda. Eisini hava flest øll virkir seinnu árini havt trupult við at fáa fólk, tí aðrir partar av arbeiðsmarknaðinum bjóða hægri lønir ella støðugari arbeiði.
Væntast kann, at fiskavirkini leggja seg eftir at automatisera framleiðsluna meira og tí fáa tørv á meira kapitali.

## 2.4 Verandi bygnaður í fiskivinnuni á landi í Føroyum

Í talvuni niðanfyri er tal sett á fyritøkurnar í fiskivinnuni á landi, sum henda frágreiðingin umrøður.

| Fiskavirkir, sum virka botnfisk | | Fiskavirkir, sum virka uppsjóvarfisk, rækjur og annað |
|---|---|---|
| Partafeløg | Virkir | Partafeløg/virkir |
| 26 | 31 | 3 |

Virkir í fiskivinnu á landi

Føroya Fiskavirking, ið hevur flakavirki í Havn, Miðvági, Vestmanna, Runavík, á Toftum og Tvøroyri, tók í 2002 ímóti umleið 27 prosentum av botnfiskinum, sum føroysk skip veiddu undir Føroyum. Øll onnur flakavirkir tóku ímóti minni enn 10 prosentum. Nummar tvey og trý í nøgd vóru Delta Seafood / Sandoy Seafood við 9,3 prosentum og Kósin við 7,8 prosentum.

Eitt sindur av samanfalli er í eigaraskaranum, sum varðar av fyritøkunum, tað vil siga vatnrættari integratión. Í fleiri førum eiga fyritøkur fleiri lið í framleiðsluni. Her er talan um loddrætta integratión, sum í nøkrum førum eisini fevnir um fiskivinnuna á sjónum.

Ein av fyritøkunum, sum virkar uppsjóvarfisk, hevur bert útlendskan kapital. Útlendskur kapitalur er annars í nøkrum av flakavirkjunum, sum virka botnfisk. Arbeiðsbólkurin hevur tó ikki fingið uppspurt, hvussu stórur útlendski ognarparturin er.

Í onkrum førum hava føroyskir íleggjarar sjálvir lagt stóran dent á at tryggja sær, at útlendskur kapitalur ikki fekk avgerandi ávirkan í fyritøkunum. Hetta hendi til dømis, tá meirilutapartapeningur í Havsbrún varð seldur.

### 2.4.1 Privatar og "almennar" fyritøkur

Tvey av størstu partafeløgunum við fiskavirkjum, sum virka vørur úr botnfiski, eru ogn hjá vinnurekandi grunnum, sum tað almenna hevur útvegað partapening til. Framtaksgrunnurin eigur Føroya Fiskavirking, og Føroyagrunnurin frá 1971 eigur Kósina.

Føroyagrunnurin frá 1971 varð upprunaliga settur á stovn fyri at bjarga Kjølbro-samtakinum. Føroyagrunnurin fekk umvegis JFK Trol meirilutan aftur í Kósini seinna helming av nítiárunum og eigur eisini onnur virkir í fiskivinnuni.

Framtaksgrunnurin varð stovnaður í 1994 fyri at bjarga og reka Føroya Fiskasølu og Føroya Fiskavirking.

Meðan lítil og ongin mótstøða hevur verið ímóti, at Føroyagrunnurin eigur meirilutan í Kósini, var frá byrjan fitt av mótstøðu ímóti Framtaksgrunninum og hansara fyritøkum. Í frágreiðingini um at einskilja fyritøkur landsins frá 2002 verður millum annað sagt:

*"Landið eigur fleiri fyritøkur, sum virka í kappingarumhvørvi. Einskildu fyritøkurnar, kappast verður við, kenna kappingartrýstið frá almennu fyritøkunum sum kappingaravlagandi og órímiligt. Hinvegin kenna almennu fyritøkurnar tíðum eigaraviðurskiftini avmarkandi fyri møguleikar teirra at klára seg í kappingini. Hesi sjónarmið hjá einskildu og almennu fyritøkunum eru í andsøgn hvørt við annað, men geva tó greiða ábending um, at óheppin vinnupolitisk viðurskifti gera seg galdandi."*

Hyggja vit at bygnaðinum í fiskivinnuni, kann staðfestast, at nógv er hent, síðan kreppuloysnir sum Føroya Fiskavirking sóu dagsins ljós. Eftir nøkur umleypandi ár er fiskivinnan á landi mestsum komin í nýggja javnvág. Størri spjaðing er í framleiðsluni á ymsu virkjunum, lønsemið er gott, og málið er allatíðina at skapa avkast. Nógv av smærru virkjunum hava funnið sær sítt grundstøði innan ávísa framleiðslu ella ávís fiskasløg. Ikki minst uppboðssølan hevur gjørt hesa spesialisering møguliga.

Góða gongdin hevur tikið broddin av áganginum á almennu fyritøkurnar. Eisini hevur tað týdning, at Føroya Fiskavirking ikki hevur økt sín marknaðarpart av keypinum av føroyskum ráfiski. Privatu fyritøkurnar hava ikki so nógv ímóti fyritøkunum, ið vinnurekandi grunnarnir eiga, sum álitið um einskiljingar vil vera við. Ivaleyst kemst hetta av, at virkini óheft av eigaraviðurskiftunum hava

lagað seg hvørt eftir øðum. Arbeiðsbólkurin heldur tó, at best er, um fyritøkurnar koma aftur á privatar hendur. Viðtøkurnar hjá Framtaksgrunninum siga eisini, at tær skulu einskiljast.

### 2.4.2 Samansjóðing millum veiðiliðið og fiskivinnuna á landi

Í løtuni er lítið samanfall í ognarviðurskiftunum hjá fiskivinnuni á landi og sjógvi. Soleiðis hevur ikki altíð verið. Undan kreppuni var nógv vanligari, at flakavirkir áttu í skipum, tí við at binda skip til ávís virkir bar til at tryggja virkjunum støðuga tilgongd av rávøru.

Í Íslandi er hinvegin stórt samanfall í ognarviðurskiftunum á landi og sjógvi. Nakrar fáar stórfyritøkur eiga meginpartin av fiskavirkjunum á landi og veiðiflotanum. Tílíkur bygnaður hevur eins og bygnaðurin hjá okkum við sær bæði fyrimunir og vansar.

Latið okkum hyggja at støðuni hjá okkum. Skipanin við fiskamarknaði og mestsum vatntøttum skotti millum fiskivinnuna á sjógvi og landi hevur havt við sær, at skipini hava fingið nógv betri prís fyri fiskin enn frammanundan. Økta kappingin um fiskin og tað, at øll kunnu fáa fatur á honum á einum marknaði, hevur gjørt, at fiskavirkini eru farin at spesialisera seg meira, og at tey hvørt í sínum lag leggja dent á framleiðslu, ið gevur bestu úrtøkuna.

Nógvir leiðarar í fiskivinnuni vænta tó, at bygnaðurin hjá okkum fer at broytast komandi árini, og at veiðiliðið og fiskivinnan á landi verða meira samansjóðað.

Í grannalondunum er ávís loddrøtt integratión millum veiðilið og fiskivinnu á landi. Fyri íleggjarar kann hesin bygnaður óivað tryggja støðri avkast. Virkini tryggja sær støðuga tilgongd av røttu rávøruni og leggja arbeiðið til rættis eftir hesum. Eitt samtak, sum bæði eigur skip og virkir, hevur eisini fleiri møguleikar at minka um rakstrarútreiðslurnar, bæði á sjógvi og landi, og harvið at gera virksemið meira lønandi fyri alt samtakið.

Tættari samband millum skip og virkir kann ivaleyst eisini hava við sær vansar. Trupult kann við tøttum sambandi vera at halda skil á, hvussu stórur partur av veiðiliðnum er útlendskur[5]. Í løtuni tykjast fyritøkurnar á landi og sjógvi hvør sær at gera tað, tær duga best. Tær halda seg til tað, sum á leiðslumáli kallast *core business*. Samanberingar[6] av fiskivinnuni í Noregi, Føroyum og Íslandi benda á, at raksturin hjá føroysku fyritøkunum er heldur bíligari enn í hinum londunum. Samanlegging av fleiri liðum kann tí hava við sær, at effektiviteturin í einstøku liðunum minkar.

Stórfyritøkur kunnu hinvegin duga betur at skapa kapitalavkast. Kappingarneytar okkara, bæði í Noreg og Íslandi, gera alt fyri at fáa fótin fastan, bæði á rávøru- og sølumarknaðunum, við beinleiðis og sínamillum íløgum. Hava vit bara lítlar, men tó effektivar fyritøkur, er lítið sannlíkt, at føroyskar fyritøkur fara at víðka sítt virksemi við at gera íløgur í fyritøkur uttanlands, og harvið fáa ein leiklut í alheimsgerðingini.

Samanumtikið kann sigast, at tættari samband millum skip og virkir hevur nógv støðri ávirkan á samlaða bygnaðin í fiskivinnuni enn møguligar útlendskar íløgur í fiskivinnuna á landi.

## 2.5 Bindingar í fiskivinnuni á landi

### 2.5.1 Verandi bindingar í fiskivinnuni

Í føroysku fiskivinnuni eru nógv alment givin rættindi og almennar bindingar.

[5] Sí fylgiskjal 3 um útlendskan kapital í íslendsku fiskivinnuni.
[6] Kanningarnar hjá Farec av lønseminum í fiskivinnuni.

Skip og reiðarí fáa fiskiloyvi við ávísum tali á fiskidøgum. Fiskiloyvini eru søgulig rættindi, men samstundis rættindi, sum bara ein ávísur partur av vinnuni fær. Skipini kunnu ikki selja fiskin frítt. Til dømis verður mótroknað í givnum veiðirættindum, um meira enn 25 prosent av veiðini verða avreidd uttanlands. Fiskur, sum verður avreiddur í Føroyum, kann bara seljast óvirkaður av landinum, um hann er boðin út á uppboðssølu í Føroyum. Kravt verður eisini, at minst 30 prosent av veiðini verða seld um uppboðssølu. Hetta eru alt almennar bindingar av vinnuni, men talan er um bindingar, sum eru knýttar at ávísum rættindum.

Fiskivinnan á landi hevur ikki serrættindi. Ein og hvør kann stovna eitt virki, men bindingar í fiskivinnuni hjá grannalondunum og tollreglur hjá marknaðarlondunum gera tað trupult at fáa lønandi rakstur í virkini við útlendskari rávøru. Føroysk virkir dúva tí bara upp á føroysk skip sum rávøruveitarar.

Tá tað snýr seg um kapitalviðurskifti og útlendska luttøku í virkseminum, eru í løtuni ongar avmarkingar í fiskivinnuni á landi. Hinvegin kann útlendski ognar- og avgerðarparturin í skipum, sum gevur rættindi til fiskatilfeingið, í mesta lagi vera 33 prosent.

## 2.5.2 Útlendskur ognarpartur - støðan í grannalondunum

Fiskivinna er í ávísan mun vard vinna í londunum kring okkum. Ísland, Noreg og ES hava hvørt í sínum lagi bindingar, tollreglur og upprunareglur, sum avmarka okkara møguleikar annaðhvørt at keypa rávøru frá teimum ella at selja teimum lidnar vørur. Til dømis eru skip í Noregi ofta bundin at avreiða á ávísum bryggjukanti. Í Íslandi minkar kvotan, um skipini selja fiskin uttanlands.

Hesar reglur ávirka virkismøguleikarnar hjá føroyskum fiskaframleiðarum.

Í talvuni niðanfyri verður hugt at kapitalviðurskiftum og ymsu reglunum um útlendskan ognarpart. Staðfestast kann, at Noreg og Ísland hava avmarkingar um útlendskan ognarpart í fiskiflotanum, og at Ísland, sum einasta land, eisini hevur avmarkingar í fiskivinnuni á landi.

| | **Fiskiveiða** | **Fiskivinna á landi** | **Alivinna** |
|---|---|---|---|
| **Føroyar** | Max 33% | Ongin avmarking | Max 33% |
| **Ísland** | Max 33% [7] | Max 33% | Ongin avmarking |
| **Noreg** | Max 40% | Ongin avmarking | Ongin avmarking |
| **ES londini** | Ongin avmarking | Ongin avmarking | Ongin avmarking |

Avmarkingar í útlendskum ognar- og avgerðarparti

Talvan vísir bara yvirskipað, hvørjar avmarkingarnar eru. Ein útgreinað lýsing av viðurskiftunum í Íslandi er løgd við sum fylgiskjal 3. Skjalið lýsir, at í verki eru avmarkingarnar í Íslandi mestsum burtur.

Lítil ivi er um, at avmarkingarnar í norsku og íslendsku fiskivinnuni hava til endamáls at varðveita rættindini til fiskatilfeingið á heimligum hondum. At íslendingar eisini avmarka, hvør kann eiga í fiskivinnuni á landi, kemst av, at rættiliga tætt samband er millum skipini og virkini. So tætt er sambandið millum skip og virkir ikki í Noregi og bara í fáum førum í Føroyum. Reglurnar í ES, sum eru karmur um eitt nú skotsku fiskivinnuna, forða als ikki fyri, at útlendingar kunnu eiga í virkjum og skipum.

[7] Sí annars nærri útgreining í fylgiskjali 3

Noreg og ES eru farin undir samráðingar um eina nýggja EBS-avtalu. Bæði norska umsitingin og vinnan vænta, at ES fer at krevja munandi broytingar í ræðisavmarkingunum[8] í norsku fiskivinnuni.

### 2.5.3 Nýggjar lógarbindingar á fiskivinnuna á landi

Í arbeiðssetninginum verða í øðrum og triðja spurningi útlendskir ognarpartar og møgulig miðsavning av eigaraviðurskiftunum umrødd. Sum tað sæst í **fylgiskjali 2,** fatar arbeiðsbólkurin hesi hugtøk soleiðis, at talan er um beinleiðis ella óbeinleiðis avgerandi ávirkan.

Løgtingið hevur hinvegin í lógini um vinnuligan fiskiskap og í lógini um aling av fiski avmarkað, hvussu nógv útlendingar kunnu eiga í fyritøkunum. Lógin um aling avmarkar eisini, hvussu nógv einstakur eigari kann eiga av allari alivinnuni í Føroyum.

Arbeiðsbólkurin skilir arbeiðssetningin soleiðis, at politiski myndugleikin umhugsar hvørt fiskivinnan á landi skal setast somu karmar, sum settir eru alivinnuni, har ongin útlendingur kann eiga meira í einstøku fyritøkunum enn 33 prosent, og hvørki føroyskir ella útlendskir íleggjarar kunnu eiga meira enn 25 prosent av øllum fyritøkunum.

Tá tað snýr seg um tey 33 prosentini av partapeninginum, ber helst til at hava ávíst eftirlit. Verri er tó at rokna umrøddu 25% eftir nøgdini av feska fiskinum, sum avreiddur verður í Føroyum.
Á hvørjum grundarlag hesi mørk skulu setast, kann bara gitast um. Tey kundu tikið støði í avreiðingarvirðinum ella avreiddu nøgdunum.

**Samlaða botnfiskaveiðin hjá feskfiskaflotanum**

| | Toskur | Hýsa | Upsi | Annað | Samlað |
|---|---|---|---|---|---|
| 1996 | 38.257 | 9.155 | 18.030 | 27.931 | 93.373 |
| 1997 | 34.609 | 16.190 | 19.996 | 31.414 | 102.209 |
| 1998 | 25.115 | 19.858 | 24.814 | 33.459 | 103.246 |
| 1999 | 19.204 | 16.790 | 30.153 | 29.670 | 95.817 |
| 2000 | 21.224 | 14.328 | 33.546 | 29.957 | 99.055 |
| 2001 | 26.747 | 14.240 | 44.488 | 29.938 | 115.413 |
| 2002 | 36.262 | 21.747 | 48.184 | 23.416 | 129.609 |

Veiða í tonsum

Ímynda vit okkum, at tað í tíðarskeiðnum frá 1996 til 2002 var lógarásett, at einstakt virki ikki mátti keypa meira enn 25 prosent av hvørjum fiskaslagi, hevði eitt felag, sum til dømis virkaði upsa, bara kunnað keypt ta rávøru, einstaka árið, sum talvan niðanfyri vísir:

**Upsi (tons)**

| Ár | Veiða | 25% |
|---|---|---|
| 1996 | 18.030 | 4.508 |
| 1997 | 19.996 | 4.999 |
| 1998 | 24.814 | 6.204 |
| 1999 | 30.153 | 7.538 |
| 2000 | 33.546 | 8.387 |
| 2001 | 44.488 | 11.122 |
| 2002 | 48.184 | 12.046 |

Um tað skuldi hent, at veiðan í 2003 fór niður á støðið í 1996, kann spyrjast, um virkið so skuldi hildið uppat at keypt upsa, hóast tað var kappingarført í prísi. Og hvør skuldi tá sagt, hvar í landinum eitt møguligt virki hjá hesum felag skuldi latið aftur? Ásannast má, at ein tílík skipan

[8] Broyting av avmarkingum í lógum (Råfiskloven og Deltagerloven) og tí monopoli sum 'salgslagene' hava.

hevði ikki kunnað virkað eftir vanligum marknaðarbúskaparligum treytum og hevði verið ógjørlig at umsitið.

Um avmarkað verður við lóg, hvussu nógvar útlendskar íløgur kunnu gerast í fiskivinnuna á landi, fer tað at hava við sær, at serloyvir mugu útskrivast í vinnuni. Í løtuni er ikki ásett, hvaðani partapeningurin skal koma. Kravt verður bara, at hann skal vera til staðar, tá eitt partafelag verður stovnað at reka fiskavirki. Verður ásett, hvussu nógvur útlendskur partapeningur kann vera í fiskivinnuni á landi, krevst serlig lóg til at góðkenna fyritøkurnar í vinnuni. Henda lógin kemur aftrat verandi vinnulóggávu. Allar royndir vísa, at økt lógarstýring hevur við sær tyngri umsiting.

## 2.6 Alheimsgerðingin og fiskivinnan

Sum nevnt í fiskivinnupolitisku stevnuni seta alheimsgerðingin og heimsmarknaðirnir alsamt størri krøv til virkisførið og kappingarførið hjá vinnuni á landi. Fíggjarlig styrki, vitan og váðafýsni eru bara nakrar av fortreytunum fyri, at vinnan stendur seg á marknaðunum. Tað kostar at vera við í tøkniligu kapprenningini. Flutningsskipanirnar verða alsamt bíligari, og tí broytist arbeiðsbýtið millum virkir, landspartar og lond. Vørurnar verða mentar, har klókastu høvdini eru. Har tøkniligi førleikin er størstur, er automatiseraða framleiðslan. Krevur framleiðslan nógva handliga arbeiðsorku, verður hon flutt í økir við lágum lønarlag. Her gongur sjón fyri søgn hjá okkum og okkara grannalondum.

Økt kapping í altjóða samfelagnum er gerandiskostur hjá fiskivinnuni á landi. Talan er ikki bara kapping frá fyritøkum í Skotlandi, Íslandi og Noregi, men eisini fyritøkum í Kina, Taivan og India. Tímalønin har er bara ein tíggjundapartur av okkara tímaløn ella minni, og hesi lond menna eisini støðugt framleiðsluna og flutningin.

Hagtøl frá ST vísa, at heimshandilin veksur hvørt ár. Vøksturin vísir eina grundleggjandi broyting í vinnulívinum, sum vit mugu læra okkum at skilja. Broytingin hevur við sær bæði fyrimunir og vansar. Sum brúkarar kunnu vit keypa betri vørur fyri lægri prísir. Á tann hátt økist materiella vælferðin. Men samstundis hvørvur fjøltáttanin í vinnulívinum við nógvum smáum virkjum í ymsu økjunum. Alheimsgerðingin hevur sostatt sosialar avleiðingar við sær. Handligu arbeiðsplássini í okkara parti av heiminum fækka.

Alheimsgerðingin er ein veruleiki, sum vit mugu liva við, um vit vilja tað ella ikki. Uppgávan hjá okkum í Føroyum verður at standa okkum undir teimum treytum, sum nýggja tíðin setir. Vit kunnu ikki byrgja okkum inni í Norðuratlantshavi og samstundis vera virkin í heimshandlinum, so lítil sum føroysk vinna nú einaferð er.

Samhandil við umheimin skapar vælferð. Vilja vit økja um vælferðina og gerast meira sjálvbjargin, mugu vit allatíðina samstarva við umheimin. Gera vit tað, eru vit við í kappingini um at fáa ta fígging, ið krevst fyri at skapa neyðugu vinnuligu menningina. Bæði vinna og land verða á henda hátt framkomin. Samstarva vit ikki við umheimin, verður fiskivinnan á landi spakuliga afturúrsigld, og úrslitið verður, at hon um fá ár ikki megnar at løna sínum starvsfólkum betur enn lond við lægsta lønarlagnum í heiminum.

## 2.7 Altjóða marknaður og ognarpartur

Føroysku fiskavirkini virka á altjóða marknaði. Hetta er galdandi fyri rávøru, har kappingin frá útlendskum virkjum er stór, og serliga í søluliðnum, har marknaðurin er allur heimurin. Eisini er hetta galdandi fyri fígging og aðrar fíggjarligar tænastur, eitt nú debitortrygging.

Um eitt føroyskt virki keypir eitt annað føroyskt virki, kann tað saktans vera fyri pengar, sum eru læntir frá útlendskum fíggingarstovni. Tað er ein fyrimunur fyri føroysku fiskivinnuna, at frí atgongd er til útlendskan kapital, tá tørvur er á honum.

Grundarlagið undir fiskivinnuni á landi er ikki tað sama sum undir fiskivinnuni á sjónum. Á sjónum er grundarlagið kvotur, fiskidagar ella rættindi til rávøruna. Í fiskivinnuni á landi eru tað bara kappingarførið og arbeiðsmegin, sum gera av, um virkini fáa fisk at arbeiða. Er eitt virki ikki kappingarført í prísi, fær tað ongan fisk, um so eigarin er føroyingur ella útlendingur. Besta kappingarførið hevur tann, sum veit mest um framleiðslu og marknað, og sum dugir at brúka sína vitan í dagliga virkseminum. Men vitanin er ikki støðug. Hon má mennast allatíðina, og tí er tað ein fyrimunur at hava lætta atgongd til nýggja vitan, eitt nú umvegis útlendskar íløgur.

### 2.7.1 Fordómar um vansar

Ein vandi, sum ofta verður nevndur í sambandi við útlendska luttøku í fiskivinnuni, er, at útlendskir eigarar hvørki vísa samfelagsábyrgd ella fyrilit fyri staðbundnum viðurskiftum. Sagt verður, at útlendingar kunnu keypa virkini og so lata tey aftur, um tey ikki bera seg. Hetta er ivaleyst meira ein fordómur enn veruleiki.

Hinvegin hava føroyskir eigarar sjálvir latið virkir aftur, tá tey ikki bóru seg. Um føroyskur kapitalur ikki setir somu krøv til rentabilitet sum útlendskur kapitalur, kann væntast, at føroysku eigararnir í longdini kortini tapa og mugu lata virkini aftur sum undir kreppuni fyrst í nítiárunum.

Tað eru fleiri dømi um, at fyritøkur innan ymiskar vinnugreinir, sum veita skipum tænastur, hava útvegað sær kundar við at gera íløgur í skip. Tílíkir íleggjarar seta ikki somu krøv sum handilsligir íleggjarar, og ofta gera teir ikki neyðugar kanningar, áðrenn íløgan verður gjørd.

Duga føroyskir íleggjarar ikki at meta um rentabilitet og neyðugar avgerðir í hesum sambandi, gagna teirra íløgur ikki vinnuni í longdini. Sama kann sigast um útlendskar íløgur. Heldur enn at skilja millum útlenskt og føroyskt, eigur tí at verða skilt ímillum íleggjarar, sum seta krøv um kappingarført avkast, og teir, sum ikki gera tað. Kapitalur, sum ikki setir krøv, er vandamikil og kann avlaga vinnuna.

### 2.7.2 "Stakeholder value"

Fyritøkur, sum gera íløgur á heimsmarknaðinum, eru farnar at hugsa øðrvísi seinnu árini. Ein burðardygg íløga verður ikki bara mett eftir útlitunum fyri at tjena nógvar pengar sum skjótast. Serliga teir íleggjarar, sum arbeiða tvørtur um landamørk, verða noyddir at hugsa fjølbroytt og taka ymisk atlit. Í longdini fara fyritøkur at hava ilt við at klára seg, um tær ikki gera ymsum áhugabólkum til vildar. Sigast kann, at fyritøkurnar nú á døgum allatíðina skulu staðfesta sín rætt at vera til, tí gera tær ikki tað, syrgja kundarnir, veitararnir, starvsfólkini ella samfelagið fyri, at tær lata aftur.

Ein fyritøka virkar ikki bara eftir treytunum hjá eigaranum. Hon má taka støðu til áhugamálini hjá eigara, leiðslu, starvsfólkum, kundum, veitarum, samstarvsfeløgum, samfelagnum og umhvørvinum. Hóast ongin ivast í rættinum hjá eigaranum til at taka avgerðirnar, mugu eigarar og leiðsla lurta nógv meira eftir hinum áhugabólkunum. Á enskum handilsmáli verður hetta kallað skiftið frá *shareholder value* til *stakeholder value*.

Ein *stakeholder* er eitt annað orð fyri ein persón ella bólk, sum hevur natúrligan og grundgivnan áhuga fyri viðurskiftunum hjá virkinum. Hugtakið *stakeholder value* er rættiliga nýtt, so enn eru fleiri, sum halda, at virkini bara skulu røkja áhugamálini hjá partaeigarunum. Soleiðis hugsaði Shell, áðrenn fyritøkan ætlaði at søkkja boripallin Brent Spar. Ógvuslig mótmæli tóku seg upp ímóti ætlanini, og onnur áhugamál enn tey hjá fyritøkuni vunnu, sama um hvøssu atfinningarnar vóru rættvísir ella ikki.

Verða partabrøv í fiskavirkjum á landi seld fyri í minsta lagi tað, tey eru verd, er tað líkamikið, um eginpeningurin er útlendskur ella føroyskur. Hugsar íleggjarin ikki um *stakeholder value*, verður íløgan skjótt virðisleys. Skuldi tað hent, at íleggjarin misrøkir *stakeholder value*, nýtist íløgan ikki at gerast virðisleys fyri kappingarneytarnar og aðrar áhugabólkar. Kappingarneytarnir kunnu tá yvirtaka eina miseydnaða íløgu hjá einum felag, sum ikki virdi ymsu áhugamálini, og skapa blómandi vinnu burtur úr henni.

### 2.7.3 Søla til hægstbjóðandi?

Skulu føroysk fiskavirkir seljast hægstbjóðandi, hevur tað ógvuliga nógv at siga fyri prísin, um virkini bara verða boðin føroyskum íleggjarum at keypa, ella um útlendskir keyparar eisini sleppa upp í part.

Skulu stór fiskivirkir seljast, kunnu møguligir einstakir føroyskir keyparar teljast á einari hond, og neyvan fæst at vita, hvat virkini veruliga eru verd, um ikki útlendskir keyparar eisini sleppa at bjóða. Ein føroyingur, sum vil <u>selja</u> sítt virki, hevur greiðan fyrimun, um hann eisini kann selja útlendingum tað, tí á stórum marknaði fæst betri prísur enn á lítlum marknaði. Skal føroyingurin hinvegin <u>keypa</u> eitt virki, fær hann fyrimun, um útlendingar ikki sleppa at bjóða, tí tá fær hann virkið bíliga.

Arbeiðið hjá hesum arbeiðsbólkinum er sett í verk, tí Framtaksgrunnurin skal selja sínar ognir. Málið hjá grunni og landi má vera at selja hægstbjóðandi ognirnar, so íløgan, sum á sinni varð gjørd, kastar so nógv av sær sum gjørligt.

Hóast møguligir einstakir føroyskir keyparar eru fáir í tali, ber væl til hjá føroyskum íleggjarum at taka seg saman um keyp av størri virkjum. Atlantic Petroleum og Havsbrún eru dømi um hetta. Atlantic Supplybase er eisini eitt dømi um, at føroyska vinnan kann finna saman.

### 2.7.4 Forðingar ella átøk fyri útlendskum íløgum

Hugburðurin til útlendskar íløgur millum manna og í politisku skipanini tykist ikki vera eins í ringum og góðum tíðum.

Mitt í nítiárunum setti landsstýrismaðurin við vinnumálum eitt átak í verk fyri at fáa útlendingar at gera íløgur í Føroyum. Í fjølmiðlunum varð tosað um at eggja útlendskum kapitali at gera íløgur í Føroyum, og at seta nýtt virksemi í gongd.

Kanningin "Invest in Faroe Islands" vísti ikki óvæntað, at útlendskir íleggjarar høvdu størstan áhuga fyri fiskivinnuni og alivinnuni. Aðrar vinnur vórðu ikki hildnar at kunna geva sama avkast[9] og vóru tí ikki líka áhugaverdar.

Nú kapitalur finst í vinnunum, er hugburðurin ikki tann sami. Útlendskur íløguhugur verður í størri mun hildin at vera ein hóttan.

Í tí partinum av Caragata-frágreiðingini, sum snýr seg um forðingar fyri útlendskum íløgum í Føroyum, verður sagt, at vinnan er ikki nóg fjøltáttað, at fáar væl riknar fyritøkur leggjast aftrat teimum verandi, og at tørvur er á einum formligum kapitalmarknaði.

Um útlendskar íløgur kundu skapt fleiri væl riknar fyritøkur, hevði samfelagið vunnið meira, enn tað vinnur við at halda útlendingum burtur, bara tí føroyingar skulu ráða einsamallir.

---

[9] Aðrir faktorar sum lítla arbeiðsmegin, fjarstøða vóru við í metingunum.

Bæði í góðum og ringum tíðum er tørvur á íløgum og samstarvi um landamørk. Vit kunnu ikki rokna við útlendskum íløgum í ringum tíðum, um avmarkingar verða settar í tíðum, har møguligt er at fáa avkast.

# 3 Fiskivinnan á landi og tørvurin á kapitali

Arbeiðsbólkurin hevur ikki kannað nágreiniliga, hvussu stóran tørv á kapitali fiskivinnan á landi hevur. Trupult er at svara spurninginum, tí nógv ymisk viðurskifti avgera, hvussu stórur tørvurin er. Bygnaðurin í vinnuni, framtíðarútlit, bindingar av ymsum slag, marknaðaratgongd, kumulerings-viðurskifti, galdandi lóggáva og kanska komandi lóggáva um avmarkingar eru forteytir, sum ávirka fiskivinnuna á landi og tørvin á kapitali.

## 3.1 Eginpeningur og lánipeningur

Ein fyritøka ger íløgur við avlopinum, sum hon fær burtur úr dagliga virkseminum og við lánum, sum verða afturgoldin við teimum avlopum, sum íløgurnar kasta av sær. Til framleiðslu og ábøtur av framleiðsluni krevst vanliga ikki kapitalur frá nýggjum íleggjarum.

Skulu hinvegin umfatandi íløgur gerast, sum ikki bara økja um verandi framleiðslu, men eisini seta í gongd nýggjar og meira krevjandi framleiðslur, er tørvur á øðrum upphæddum enn teimum, fyritøkan frammanundan hevur.

Lítil ivi er um, at fiskivinnan á landi má broyta framleiðsluna munandi komandi árini. Neyðugt er at automatisera hana meira. Hetta gerst bara við nýggjum kapitali, um hann so er føroyskur ella útlendskur. Føroysk virkir kunnu fáa nýggja vitan um marknað og tøkni, samstarva tey við útlendskar íleggjarar, tá nýggjar leiðir skulu roynast.

Í seinastu frágreiðingini hjá Búskaparráðnum í 2002 verður sagt um føroyska vinnu sum heild:

> *Miðal árligu íløgurnar eru hesi árini góð 15 % av BTI. Hetta má metast at vera heldur lágur íløgupartur, tá havt verður í huga, at bara fáar og smáar íløgur vórðu gjørdar tey 5 árini frammanundan hesum skeiðnum. ...*
>
> *... Tann vøksturin, sum skal vera í búskapinum, tá hetta skjóta vaxtrarskeiðið er av, skal koma frá nýíløgum í eitt kapitalapparat, sum er meira produktivt enn tað gamla. Enn verður búskaparliga framgongdin borin uppi av vaxandi tali av arbeiðsfólki, men tað kann ikki væntast, at hetta verður keldan til vøkstur fleiri ár aftrat. Tá skal vøksturin koma frá moderniseringini av kapitalapparatinum, sum ger arbeiðsplássini meira produktiv, enn tey vóru frammanundan.*
> *Framyvir fer tað at hava týdning, at íløgur verða gjørdar, bæði føroyskar og útlendskar, fyri at økja um produktivitetin í privatu framleiðsluvinnunum og privatu tænastuvinnunum.*
>
> *... At flakavirkini hava trupult við at skaffa sær arbeiðsmegi, er tí tekin um, at produktiviteturin í flestu øðrum vinnum er so høgur, at tær kunnu gjalda hægri lønir, enn flakavirkini kunnu. Tað vil siga, at tað í veruleikanum er eitt positivt tekin, at flakavirkini ikki klára seg í kappingini um arbeiðsmegina, tí tað merkir, at produktiviteturin í øðrum vinnum og harvið livistøðið, føroyska arbeiðsmegin kann vinna sær har, hevur yvirhálað tað avkast, sum lutfalsliga lági produktiviteturin á flakavirkjunum kann bjóða realkapitalinum og arbeiðsmegini.*

Talan hjá Búskaparráðnum er rættiliga greið. Skal fiskivinnan á landi í Føroyum mennast og bjóða føroyingum kappingarfør arbeiðspláss, mugu íløgur gerast fyri at hækka produktivitetin. Verður hetta ikki gjørt, gerst vinnan ikki kappingarfør uttan útlendska arbeiðsmegi, og tá kann eitt sindur illavorðið verða spurt, hvønn tilverurætt fiskivinnan á landi í Føroyum hevur.

Ein onnur staðfesting um kapitaltørv er í frágreiðingini um at einskilja fyritøkur landsins frá 2002. Sagt verður millum annað: *At klára seg í kappingini mugu almennar fyritøkur hava rásarúm at laga virksemið til skiftandi eftirspurning, og kann hetta hava við sær kapitaltørv til at fíggja tíðarhóskandi framleiðslutól.*

## 3.2 Møguligir íleggjarar

Útlendskur kapitalur krevur úrslit og støðugar og helst kendar karmar at virka í. Úrslitini í fiskivinnuni á landi hava verið á góðari leið seinnu árini. Men í eygunum á útlendskum íleggjarum eru karmarnir hjá vinnuni kanska ikki líka góðir sum hjá kappingarneytunum.

Okkara støða sum 3. land í mun til ES hevur við sær, at føroysk virkir ikki hava líka tryggar karmar sum kappingarneytar okkara í Íslandi og Noreg hava við EBS skipanini, tá umræður marknaðaratgongd.

Vinnuligar íløgur verða bara gjørdar fyri at tryggja íleggjarunum so stórt avkast sum gjørligt. Vanliga verður skilt ímillum tvey sløg av íleggjarum, **strategiskar** íleggjarar og **finansiellar** íleggjarar.

### 3.2.1 Finansiellir íleggjarar

Ein finansiellur íleggjari roynir at fáa eginpeningin at kasta sum mest av sær og syrgir fyri, at váðin er so lítil sum gjørligt, men leggur annars ikki so nógv í, hvat virkið framleiðir, og hvørjum tað arbeiðir saman við. Íleggjararnir av hesum slag eru ofta eftirlønargrunnar og feløg, sum hava um hendi stórar peningaupphæddir. Finansiellir íleggjarar spjaða vanliga váðan út á nógvar fyritøkur og leggja tí ikki í at eiga avgerandi partar í einstøkum feløgum.

Orsakað av váðanum halda finansiellir íleggjarar sjáldan fiskivinnu vera eina áhugaverda vinnu at gera íløgur í. Hóast føroyska fiskivinnan á landi hevur kastað fitt av sær seinnu árini, er avkastið ikki betri enn so, at sama avkast kann fáast aðrastaðni við minni váða. Tí kann neyvan væntast, at finansiellir íleggjarar fara at seta stórvegis av peningi í fiskivinnuna á landi.

### 3.2.2 Strategiskir íleggjarar

Strategiskir íleggjarar leggja hinvegin nógv í, hvat virkið framleiðir og selur, og hvørjum tað arbeiðir saman við. Strategiskir íleggjarar eru oftast feløg úr somu vinnugrein, veitarar ella kundar hjá felagnum, sum pengar skulu setast í, og sum vænta sær handilsligan fyrimun av at knýta ymisk feløg tættari saman. Strategiskir íleggjarar vilja vanliga hava eitt orð at siga um raksturin hjá felagnum og ogna sær tí ofta stóran part av felagnum.

Ilt er at meta um, hvussu stóran áhuga strategiskir íleggjarar hava fyri fiskivinnuni á landi. Men roknast má við, at um teir gera íløgur í vinnuna, vilja teir hava avgerandi ávirkan á, hvussu feløgini skulu rekast. Tað fáa teir við at ogna sær meginpartin av eginpeninginum. Ber hetta ikki til, tryggja teir sær t.d. ávirkan við ábyrgdarpeningi, lánipeningi, partaeigarasáttmála ella bindandi sáttmála um keyp av vørum. Ivaleyst finnast aðrir mátar at tryggja sær ávirkan, men hetta eru mest vanligu mátarnir, ið brúktir verða í fiski- og alivinnuni.

Tað er ikki serliga sannlíkt, at strategiskir íleggjarar gera íløgur í Føroyum, um teir ikki samstundis kunnu tryggja sær munandi ávirkan.

### 3.2.3 Hvussu kanst tú stýra uttan at eiga

Eitt dømi um, hvussu tú kanst stýra fiskavirkjum á landi í Føroyum neyvt uttan at eiga í teimum, er Føroya Fiskasøla, tá hon var lutafelag. Fiskasølan átti ongan partapening í virkjunum. Tvørturímóti áttu virkini Fiskasøluna. Men ongin ivaðist í, at tað var Fiskasølan, sum við søluavtalum og fígging av vørugoymslum og debitorum stýrdi virkjunum. At Fiskasølan haraftrat sum stórpartataeigari í Sjóvinnubankanum hevði ávísa ávirkan á fíggingina, er ein onnur søga, men tað kom henni uttan iva væl við.

Eitt felag nýtist ikki at vera føroyskt fyri at fáa so avgerandi ávirkan á fiskivinnuna á landi, sum Fiskasølan hevði. Útlendsk feløg og íleggjarar kunnu eisini tryggja sær tílíka ávirkan.

Tað sum er avgerðandi er, at vit tryggja gjøgnumskygni í ognarviðurskiftum.

### 3.2.4 Føroyskir íleggjarar

Føroyski stórkapitalurin er ógvuliga miðsavnaður, meðan uppspardi peningurin annars er rættiliga spjaddur. Leysliga mett er samlaði kapitalurin í Føroyum 18 milliardir krónur. Av teimum eru uml. 5 milliardir krónur samlaðar hjá peningastovnunum og tryggingarfeløgunum. Privatar fyritøkur standa fyri uml. 2 milliardum. Umleið 6 milliardir eru býttar millum nógvar smáar uppsparararar heilt frá barninum við 50 krónum á sparibókini. Restin av kapitalinum er almennur.

Peningastovnar og tryggingarfeløg kunnu ikki roknast sum strategiskur íleggjari. Tey vilja spjaða váðan so nógv sum gjørligt og gera tí neyvan stórvegis íløgur í fiskivinnuna á landi.

Tær pengasterkastu fyritøkurnar í Føroyum eru bara í lítlan mun knýttar at vanligari fiskivinnu á landi. Onkur er almenn ogn og onkur lutvíst almenn og lutvíst útlendsk. Í teimum flestu stóru fyritøkunum er kapitalurin bundin í íløgur innan teirra egna vinnuøki. Onkrar av hesum fyritøkum kunnu kanska hugsast at vilja gera íløgur í fiskivinnuna á landi. Men hóast peningaligi førleikin er til staðar, er tað ósannlíkt, at hesar fyritøkurnar fara at eiga meirilutan í stórum fiskavirkjum á landi. Hóast fyritøkur við næstan 100 milliónum krónum í eginpeningi als ikki eru smáar í Føroyum, og nógvar teirra eisini eru strategiskir íleggjarar, hava tær neyvan peningaliga førleikan til einsamallar at keypa meirilutan í stórum fiskavirkjum á landi.

Ein triðingur av teimum 18 milliardunum eru spjaddur út á einstaklingar. Skal hesin parturin gera munandi íløgur í fiskivinnuna á landi, mugu fleiri íleggjarar taka seg saman ella gera íløgurnar umvegis íleggingarfeløg ella partabrævamarknað.

## 3.3 Útlendskar íløgur í fiskivinnuni á landi í Føroyum

Sum nevnt gera fyritøkur íløgur uttanlands av fleiri orsøkum. Viðhvørt verða íløgurnar gjørdar fyri at tryggja íleggjaranum størri ávirkan og atgongd til marknaðin. Málið kann eisini vera at laga framleiðsluna til marknaðin. Hetta slagið av íløgum hava vit sæð føroyskar fyritøkur gjørt. Eitt nú Vestsalmon, sum hevur fyritøku í Danmark.

Fyritøkur kunnu eisini gera íløgur í útvinning av ríkidømi og tilfeingi uttanlands til tess at fáa bíliga rávøru við betri góðsku. Hetta slagið av útlendskum íløgum fata nógvir føroyingar sum ein vanda. Í løtuni eigur fiskivinnan á landi í Føroyum tó onki náttúrugivið ríkidømi ella tilfeingi, og útlendsku íløgurnar í vinnuna eru heldur ikki nógvar.

Útlendskar fyritøkur hava ikki havt trupult við at keypa rávøru í Føroyum í kapping við føroysku virkini. Hóast vinnan á landi verður hildin at vera rættiliga kappingarfør samanborið við fyritøkur

uttanlands, er hon ikki sloppin at ráða púra einsamøll, tá tað snýr seg um rávøruna. Hinvegin hava føroyskar og útlendskar fyritøkur eisini samstarvað fyri at tryggja sær vørur við høgari góðsku.

### 3.3.1 Fyrimunir við útlendskum íløgum

Tá talan er um at eggja útlendskum fyritøkum til at gera beinleiðis íløgur í einum landi, verða hesir fyrimunir vanliga nevndir:

- útlendski kapitalurin førir við sær nýggja og betri tøkni
- útlendski kapitalurin mennir leiðsluførleikan í fyritøkuni og tí í samfelagnum sum heild
- hann gevur atgongd til nýggjar marknaðir
- hann skundar undir vøkstur og menning í samfelagnum.

Útlendskur kapitalur kann vera við til at tryggja vinnuni betri atgongd til marknaðir og gera hana meira professionella. Hann kann eisini gera, at virðið á føroyskum partabrøvum hækkar, so meira fæst fyri tey, tá tey verða seld.

Verður meira útlendskur kapitalur settur í føroysku fiskivinnuni, spjaðist váðin hjá føroyska kapitalinum samstundis. Føroyski kapitalurin kann tá setast í aðrar vinnur ella fiskivinnu í øðrum londum. Vinnulívið í Føroyum er næstan bara fiskivinna, og verður kreppa aftur sum í nítiárunum, og føroyskur kapitalur bara er í fiskivinnuni, kann tann óhepna støða taka seg upp, at meginparturin av vinnulívskapitalinum í Føroyum hvørvur í einum. Loyva vit hinvegin útlendskum kapitali at taka ein part av váðanum, verður føroyskt vinnulív betur ført fyri at standa ímóti eini møguligari kreppu.

Arbeiðsbólkurin er ikki ósamdur við teimum búskaparfrøðingum sum mæla til, at búskapurin er opin. Útlendskur kapitalur eigur at fatast sum eitt tilfeingi, ið kann skapa vøkstur og gera stórt gagn í vinnuni og samfelagnum sum heild.

### 3.3.2 Vandar við útlendskum íløgum

Arbeiðsbólkurin heldur ikki, at stórir vandar standast av at loyva útlendskum kapitali upp í fiskivinnuna á landi. Ein møguleiki kundi verið, at útlendingar keyptu stóran part av fiskivinnuni á landi og tann vegin keyptu seg inn í fiskivinnuna á sjónum. Við lógini um vinnuligan fiskiskap er hetta tó ikki møguligt[10], hóast tað er verri at eftirkanna, tá íløgur verða gjørdar gjøgnum fleiri lið.

Ein annar vandi við útlendskum íløgum kann vera, at førleikin at leiða fyritøkurnar í høvuðsvinnuni minkar. Yvirtaka útlendskar fyritøkur meirilutan í fyritøkunum, kann hugsast, at flestu leiðarastørvini ikki verða mannað her á staðnum, men at allar tær stóru avgerðirnar verða tiknar uttanlands.

Hetta er meira ein ræðumynd enn veruleiki og kemur næstan bara fyri í londum, har trupult er at fáa fólk við útbúgving og royndum. Í føroysku oljuvinnuni er gongdin enn henda, men tað kemst av, at vit hava ikki havt fólk við røttum útbúgvingum, og tí oljufeløgini vanliga ikki seta umsitingar á stovn, fyrr enn oljan verður útvunnin.

Royndirnar við útlendskum kapitali í alivinnuni bera als ikki boð um, at føroyingar eru fyri vanbýti.

Ein annar vandi, sum onkuntíð verður nevndur, er, at sleppa útlendingar at eiga í føroyskari vinnu, fara teir at flyta vinningin av landinum. Spurningurin er, um hetta er rætt. Føroyski partafelagsskatturin er kappingarførur og lægri enn í grannalondunum, og tí er tað natúrligt hjá

[10] Annað er, um lógarkrøvini kunnu varðveitast, verða Føroyar partur av ES og CFP. Spurningurin tá verður, um fiskivinnan á landi í Føroyum er so kappingarfør, at veiða verður løgd upp her.

fyritøkum at lata avlopini verða skattað her. Tað ber ið hvussu er væl til at varðveita vinnuliga virksemið í landinum við kappingarførum lógarkørmum.

# 4 Miðsavning av eigaraviðurskiftunum

Vinnulívið kring allan heim verður støðugt meira miðsavnað við samanleggingum. Miðsavningin hevur vundið alt meira upp á seg seinastu 10 árini og stendst av nýggjari tøkni og frælsari og betri marknaðarviðurskiftum. Gongdin sæst aftur í fleiri vinnugreinum í Føroyum. Í fiskivinnuni á landi eru eigaraviðurskiftini kanska minst miðsavnað samanborið við aðrar vinnur, men rákið er týðiligt og heldur ivaleyst fram, um útlendingar ogna sær virkini ella ikki. Orsakað av alheimsgerðingini, sum hevur við sær støðugt økta kapping, vilja fyritøkurnar vaksa seg stórar og sterkar.

Fylgir fiskivinnan á landi ikki við hesum ráki, kann hon gerast eftirbátur, og virkini enda sum týdningarleysir undirveitarar.

Ein vandi er sjálvandi, at monopol stinga seg upp á ráfiskamarknaðinum. Tann støðan er als ikki ynskilig, og sum lýst niðanfyri er hon neyvan aktuel í Føroyum. Arbeiðsbólkurin leggur herðslu á, at møgulig monopol skulu stýrast við ásetingum í kappingarlógini og ikki við serlóggávu fyri einstakar vinnugreinir.

## 4.1 Miðsavning í mun til sølu- og keypsmarknaðin

Fiskivinnan er ein útflutningsvinna. Sølumarknaðurin er allur heimurin, og kappingarneytarnir eru fiskavirkir um allan heim. Um so eigaraviðurskiftini í fiskivinnuni á landi vórðu miðsavnað so nógv, sum yvirhøvur hugsast kann, var ongin vandi fyri monopolstøðu á sølumarknaðinum.

Ráfiskamarknaðurin í Føroyum er eisini altjóða marknaður. Størsti parturin av fiskinum verður seldur um skipaðu uppboðssøluna. Tann, sum hevur hægsta boðið, fær fiskin. Fiskakeyparar úr Føroyum, Skotlandi, Danmark, Týsklandi, Íslandi, Onglandi og Fraklandi bjóða og keypa hvønn dag á hesum marknaði; útlendsku feløgini tó umvegis føroyskar millummenn. Restina selja reiðaríðini til keyparar í Føroyum og uttanlands.

Flutningssamband er nú hvønn dag til grannalondini. Hetta er eisini við til at gera føroyska ráfiskamarknaðin til ein altjóða marknað.

Fyri at undirstrika týdningin av altjóða keypinum av ráfiski verða nøgdirnar av samlaða útboðnum av botnfiski, ið útfluttar vórðu sum heilur fiskur frá 2000 til 2002, her vístar í prosentum:

| **Útflutt heilt í % av veiðini** | | | |
|---|---|---|---|
| | **2000** | **2001** | **2002** |
| Toskur | 18 | 17 | 25 |
| Hýsa | 28 | 45 | 51 |
| Upsi | 4 | 8 | 17 |
| **Samlað fyri hesi** | **13** | **17** | **27** |

Vert er at vísa á, at føroyska veiðan eftir botnfiski er ógvuliga lítil samanborið við tað, sum veitt verður um allan heim. Eitt ár veiða vit umleið 100 túsund tons, meðan veiðan í øllum heiminum er 90 mió. tons. Verður hugt at veiðuni í Norðuratlantshavi, er føroyska botnfiskaveiðin umleið 5-6 prosent av samlaðu veiðuni.

## 4.2 Miðsavning á heimamarknaði ella útflutningsmarknaði

Munur er á at miðsavna eina vinnu, sum selur sínar vørur á heimamarknaðinum, og vinnur, sum virka á altjóða marknaðinum. Hyggja vit at televinnuni í Føroyum, so er neyvan nakar ivi manna

millum, at tað er gagnligt fyri støðið á tænastum og prísum, at tveir stórir veitarar eru á telemarknaðinum í dag heldur enn bara ein.

Í Finnlandi er Nokia stóri framleiðarin av telefonum. Finski búskapurin hevur havt stórt gagn av, at eitt so sterkt felag hevur framleitt og útflutt telefonir í so stórum tali, sum Nokia hevur gjørt. Í Finnlandi verður ofta sagt, at tað var Nokia, sum hjálpti Finnlandi úr búskaparkreppuni í nítiárunum. Nokia er rættiliga einaráðandi sum framleiðari av telefonum í Finnlandi, men kappast við fleiri onnur feløg um at selja telefonir bæði á heims- og heimamarknaðinum.

Fiskur í Føroyum verður næstan bara virkaður til útflutnings. Tað hevur tí ikki so stóran týdning fyri føroyska marknaðin, um vinnan á landi verður meira miðsavnað. Ein ávís miðsavning kann vera við til at styrkja vinnuna í altjóða kappingini.

## 4.3 Altjóða mát fyri miðsavning

Herfindahl-Hirschman-Index (HHI) er eitt mát fyri miðsavning á einum marknaði. Tað verður roknað út við at falda marknaðarpartin hjá hvørjum virki á marknaðinum við sær sjálvum og síðani við at leggja øll tølini saman. Hevur ein marknaður til dømis fýra virkir, sum hava ávikavist 30, 30, 20 og 20 prosent av marknaðinum, er HHI 2600 ella $30^2 + 30^2 + 20^2 + 20^2 = 2600$.

HHI tekur hædd fyri býtinum á marknaðinum og lutfalsligu støddini á fyritøkunum á marknaðinum. HHI hækkar, bæði tá talið á fyritøkum lækkar, og tá munurin í stødd millum fyritøkurnar á marknaðinum veksur. Marknaðir, har HHI liggur millum 1000 og 1800, eru at rokna sum næstan miðsavnaðir, meðan marknaðir, har HHI er oman fyri 1800 stig, eru at roknað sum avgjørt miðsavnaðir. Sambært samanleggingarreglum í USA skulu marknaðir kannast, tá HHI hækkar við meiri enn 100 stigum.

Kappingarráðið er farið at kanna, hvussu høgt talið er fyri ymsu vinnugreinirnar í Føroyum. Hóast kanningin ikki er liðug enn, hevur arbeiðsbólkurin fingið ávegis upplýsingar um vinnuøkið *virking av fiski*. Fyribilstølini vísa, at HHI-talið fyri hetta økið liggur undir 500, og er tí avgjørt millum minst miðsavnaðu vinnuøkini í landinum. Hetta merkir, at virkingin av fiski á landi kann miðsavnast nógv meira, áðrenn talan er um møguligar vansar.

Størstu handilsøkini av týdningi fyri fiskivinnuna á sjónum eru olja, skipasmiðjur, reiðskapur, trygging, bankavirksemi, telefonsamband, heilsølur, flutningur og fiskakeyparar.

Talvan niðanfyri vísir, hvussu nógvir útbjóðarar eru á hvørjum vinnuøki:

| **Handilsøki** | **Tal á útbjóðarum** |
|---|---|
| Olja | 2 |
| Skipasmiðjur | 1 stórur og nakrir smærri |
| Reiðskapur | Í flestu førum ein stórur á hvør sínum øki |
| Trygging | 2 |
| Bankavirksemi | 2 stórir og 2 smáir |
| Telefonsamband | 3 |
| Heilsølur | Umleið 5 |
| Millumlandaflutningur | 3 stórir og onkur smærri |
| Uppboðssøla av fiski | 1 |
| Fiskakeyparar | Yvir 40 í Føroyum + útlendskir keyparar |

Tølini vísa, at eigaraviðurskiftini í fiskivinnuni á landi í Føroyum eru nógv minni miðsavnað enn í hinum stóru vinnunum við tilknýti til fiskivinnuna. Umframt nevndu vinnuøki kunnu nevnast el-framleiðsla, fólka- og vøruflutningur, pakkitilfar, salt, starvsstovuroyndir, veiting av framleiðslu- og skrivistovutólum og fóðurframleiðsla, sum viðkemur alivinnuni.

Flestu vinnuøki í Føroyum eru nógv meira miðsavnað enn fiskivinnan á landi. HHI-talið fyri hesar vinnur er eisini langt oman fyri 1800.

## 4.4 Fyrimunir og vansar við at miðsavna eigaraviðurskiftini í fiskivinnuni á landi

Verða eigaraviðurskiftini í fiskivinnuni á landi miðsavnað, kann tað eins og í øðrum vinnum hava við sær fyrimunir av stórdrift og skapa produktivitet til gagns fyri fiskivinnuna á sjónum. Prísirnir hækka, góðskukrøvini verða greiðari, lønirnar og umstøðurnar hjá arbeiðsfólkinum verða betri, tøknin mennist, nýtslan av veiðini verður fjølbroyttari, og fíggjarliga avlopið veksur.

Hinvegin má ásannast, at føroysk fiskaframleiðsla seinastu árini eisini hevur dugað væl at gagnnýtt fyrimunir av smádrift, og hugsandi er, at hetta hevur havt góða ávirkan á kappingarførið. Fyrimunir av smádrift hava við sær, at fyritøkurnar hava lætt við at laga seg til broyttar umstøður og standa seg í vinnum, sum eru fyri stórum broytingum. Smærru virkini eru við til at stabilisera vinnuna og gera hana fjølbroytta, tí tey kunnu leggja seg eftir at framleiða servørur. Smáu virkini kunnu hinvegin hava truplari við at menna seg tøkniliga.

Vandin er ikki at miðsavna eigaraviðurskiftini. Arbeiðsbólkurin heldur tað vera nógv vandamiklari at krevja politiskt, at fiskivinnan á landi skal hava ein ávísan bygnað, ið áleggur vinnuni at skipa virksemið í smærri eindir.

**Fylgiskjal 1**

**Tórshavn, tann** 09.08.2002
**J.Nr.:**
(at tilskila í svari)

**Viðgjørt:** AP

# Arbeiðssetningur viðvíkjandi strukturinum í fiskivinnuni á landi

Framtaksgrunnur Føroya hevur í skrivi dagf. 12. juni 2002 vent sær til landsstýrismannin í vinnumálum við fyrispurningi m.a. um, hvør politiski hugburðurin er til ein møguligan útlendskan ognarpart, tá Føroya Fiskavirking og Føroya Fiskasøla verða seld.

Í ávísan mun er lóggivið um, hvussu strukturin í fiskivinnuni á sjónum og í alivinnuni skal vera. Spurningarnir, sum nevndin fyri Framtaksgrunnin hevur sett, hava samband við spurningin um strukturin í fiskivinnuni á landi í framtíðini, og um lóggivið eigur at verða um hetta. Hesir spurningarnir eru ikki serliga viðgjørdir í landsstýrinum.

Í sambandi við orðaskifti um einskiljing av Føroya Fiskavirking so hava fleiri av politisku flokkunum boðað frá, at lógaruppskot kann væntast at verða lagt fram í Løgtinginum, sum avmarka møguleikarnar fyri, at útlendingar í ov stóran mun kunnu keypa seg inn í flakavinnuna.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur tí avgjørt at seta arbeiðsbólk at gera frágreiðing og møguligt tilmæli um, hvørt lóggivið eigur at verða á hesum øki og í so fall hvussu.

Arbeiðsbólkurin hevur hesi umboð:

1 umboð fyri Vinnumálaráðið, formaður
1 umboð fyri Fiskimálaráðið
1 umboð fyri Menningarstovuna
Umboð fyri vinnuna sum Vinnuhúsið tilnevnir

Arbeiðsbólkurin skal við støði í vinnupolitikkinum og í møguliga øðrum vinnupolitiskum atlitum:

1. Lýsa hvør tørvur er á kapitali í fiskivinnuni á landi.
2. Lýsa møguligar fyrimunir og vandamál viðvíkjandi útlendskum ognarparti í fiskivinnuni á landi.
3. Lýsa møguligar fyrimunir og vandamál viðvíkjandi miðsavnan av eigaraviðurskiftunum í fiskivinnuni á landi.
4. Lýsa í hvønn mun útlendskur ognarpartur kann ávirka strukturin í fiskivinnuni á landi.
5. Gera møguligt tilmæli um lóggávu á økinum.

Arbeiðsbólkurin skal vera liðugur við arbeiði sítt 1. nov. 2002.

Bjarni Djurholm
Landsstýrismaður

# Fylgiskjal 2

## Lýsingar av orðum

| | |
|---|---|
| *Fiskivinna á landi:* | Virkir, sum í fyrstu hond virka veiddan, feskan fisk, landaður í Føroyum. |
| *Útlendskur:* | Sum ásett í løgtingslóg nr. 70 frá 9. juni 1988 um aling av fiski og í løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap. |
| *Avgerandi ávirkan:* | Ognarpartur, ið beinleiðis ella óbeinleiðis gevur avgerandi ávirkan á virki við partapeningi, atkvøðurætti ella á annan hátt. |
| *Miðsavning:* | Ávísur prosentpartur, sum gevur beinleiðis ella óbeinleiðis avgerandi ávirkan á fiskivinnuna á landi sum heild við partapeningi, atkvøðurætti ella á annan hátt. |
| *Bygnaður:* | Bygnaðurin í vinnuni, herundir býtið í smá og stór virki, býtið millum loddrætt integreraðar fyritøkur í fiskivinnuni á sjónum og landi, framleiðslu og sølu, vatnrætt integrerað virki við sama eigaraskara og onnur óheft virki, herundir spesialiserað virki og samansetingin av eigaraskaranum í fiskivinnuni á landi. |
| *Fyrimunir og vansar:* | Arbeiðsbólkurin hevur valt at lýsa fyrimunir og vansar við atliti til samfelagsbúskaparlig áhugamál, kappingarførið hjá fiskivinnuni á landi sum heild og sjónum, uppbygging av vitan um marknað, tøkni og leiðsluførleika v.m. |
| *Vinna við serloyvum:* | Vinna, ið krevur serstakt loyvi frá landsstýrismyndugleika at fara undir til dømis vinnuligan fiskiskap, alivinnu, landbúnað á festijørð, vinnuliga orkuframleiðslu, telesamskifti, tryggingarvirksemi v.m. |

## Fylgiskjal 3

# Útlendskar íløgur í íslendsku fisikivinnuni

Høvðusreglan í Íslandi er, at útlendingar (foreign residents) hava ikki loyvi at gera íløgur í íslendsku fiskivinnuna. (Lóg nr. 34 frá 1991). Men við eini seinni broyting, lóg nr. 46 frá 1996, hevur Altingið givið útlendingum eina óbeinleiðis leið til at gera íløgur í fiskivinnuna. Fiskivinnan verður her lýst sum fiskivinna á landi og fiskivinna á sjónum. (Fiskivinna á landi fevnir ikki um virksemið at gera fiskavøruna meira egnaða til flutning, føði og matgerð.)

Í grein 4 í lóg nr. 46 frá 1996 stendur millum annað, at:

Ein íslendsk fyritøka kann vera virkin í fiskivinnuni:

- ✓ Um onnur íslendsk fyritøka hevur tamarhald á henni. Ein íslendsk fyritøka verður lýst sum heimahoyrandi í Íslandi, har íslendingar eiga meirilutan í fyritøkuni ella hava meirilutan av atkvøðum ella at á annan hátt hava veruligt tamarhald á fyritøkuni.

- ✓ um útlendingar ikki eiga meira enn 25 prosent av fyritøkuni, roknað eftir partapeninginum ella byrjunarkapitalinum. Tó kunnu útlendingar eiga 33 prosent av fyritøkuni, um parturin hjá fyritøkuni í fiskivinnuni er minni enn 5 prosent.

Ásetingarnar merkja, at útlendingar kunnu eiga upp til 49 prosent í íslendskari fyritøku (B) utanfyri fiskivinnuna. B er tá ein íslendsk fyritøka, sum kann eiga allan partapeningin í einari fiskivinnu-fyritøku, sí niðanfyri.



Niðanfyri er ein annar møguleiki lýstur.

Fyritøka B og C eiga fyritøku A. Fyritøka B er íslendsk, skilt soleiðis, at 51 prosent er á íslendskum hondum og 49 prosent á útlendskum hondum. B eigur 75 prosent av fyritøku A. Fyritøka C er útlendsk fyritøka, sum eigur 25 prosent av A.

Hetta merkir, at: 25 prosent +(49% av 75%=36,7%)= 61,7 prosent eru á útlendskum hondum.




Niðurstøðan er tí, at útlendingar umvegis holdingfeløg kunnu gera íløgur í íslendska fiskivinnu. Spurningurin er tó, um dømi 2 omanfyri kann gerast veruleiki. Dømi eru ikki um tað enn.